# Nýggir og væl hildnir leigubilar

**Summarið er háseong hjá teimum sum leiga bilar út. Ein av stóru bilaútleigarunum er "62°N car rental". Vit leggja stóran dent á at hava nýggjar og væl hildnar bilar, sigur Brian V. Poulsen, sum hevur ábyrgd av leigubilunum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Høvuðssætið hjá 62°N í Gundadali. Herfyri fekk "62°N car rental" fýra nýggjar Mitsubishi Outlander*

Í dag eru tað fleiri fyritøkur, sum bjóða seg fram við bilaútleigan í Føroyum, og ein ávís kapping er millum hesar fyritøkur. Ein av stóru bilaútleigarunum er fyritøkan "62°N car rental", sum umboðar Hertz, Europcar og Sixt í Føroyum. Talan er um útleigan av bilum í Føroyum og í útlandinum.

Fyritøkan hevur 40 leigubilar, sum eru nýggir og sera væl hildnir. Í miðal eru teir 11 mánaðir gamlir. Átta av bilunum eru spildurnýggir. "62°N car rental" hevur leigubilar bæði á Flogvøllinum í Vágum og á høvuðsskrivstovuni í Gundadali í Havn.

Talan er um bilar í nógvum ymiskum støddum sum t.d. Mazda 2, Mazda 3, Mazda 5, Mazda 6, Peugeot 207, Peogeot 307, Nissan Quasqai og Mitsubishi Outlander.

Vit kunnu bjóða okkum fram til fyritøkur og almennar stovnar í sambandi við vitjanir, konsertir og onnur størri tiltøk við fleiri eins bilum, sigur stjórin í "62°N car rental", Kent Christensen, sum leggur afturat, at fyrra hálvár í ár hava vit havt eina framgongd upp á heili 14 prosent, og tað sær gott út fyri summarið.

"62°N" er eitt samtak við nógvum virksemi. Fyritøkan rekur ferðaskrivstovu, flogferðasølu, kafeteria, handling, bilaútleigan og Hotel Vágar. 60 fólk starvast hjá "62°N" samtakinum. Brian V. Poulsen hevur ábyrgdina av leigubilunum.



*Brian V. Poulsen hevur ábyrgdina av leigubilunum hjá "62°N car rental"*



## Bilatorgið



**Ford Focus 1,8 Tdci**

**Árg:** 2003 **Km:** 104.000
**Litur:** koksgráur **Prísur: 95.000**

Aircondition, cd spælara, el rútar, el spegl, hita í setrunum, í sera góðum standi. **Fyrr: 139.000 kr.**



**Ford Ka**

**Árg:** 2006 **Km:** 29.000
**Litur:** lilla **Prísur: 69.000**

Fittur lítil bilur :) **Fyrr: 89.000 kr.**



**Berlingo 1,9d Vørub**

**Árg:** 2006 **Km:** 25.000
**Litur:** svartur **Prísur: 119.000**

Krók, cd spælara, alu felgir, eykasett av vetrardekkum, bilurin er í sera góðum standi.



**Hyundai Getz aut**

**Árg:** 2006 **Km:** 14.000
**Litur:** silvur **Prísur: 119.000**

Aut gear, cd spælara, el rútar, el spegl, í sera góðum standi.



**Mazda Premacy Aut-gear**

**Árg:** 2002 **Km:** 75.000
**Litur:** silvur **Prísur: 89.000**

Aircondition, aut gear, tokulyktir, el rútar, el spegl, cd spælara, í góðum standi. **Fyrr: 119.000 kr.**



**Hyundai Sonata**

**Árg:** 2003 **Km:** 39.000
**Litur:** silvur **Prísur: 45.000**

Klimaanlegg, alu felgir, cd spælara, el útar, el spegl.
**Avheintingartilboð !!!!**



**Audi A4 1.8 Turbo**

**Árg:** 2008 **Km:** 3.000
**Litur:** hvítur **Prísur: 319.000**

Klimaanlegg, fartpilot, bluetooth, multifunk.róður, el rútar, el spegl, sum nýggjur. **Fyrr:359.000 kr**



**Suzuki Grand Vitara 1.6i - Van**

**Árg:** 2005 **Km:** 35.000
**Litur:** vínreyður **Prísur: 99.000**

4x4, Cd spælara, krók, el rútar, el spegl, í sera góðum standi.
**Fyrr: 119.000 kr.**



**Audi A6 Limousine**

**Árg:** 1998 **Km:** 54.000
**Litur:** svartur **Prísur: 159.000**

Aircondition, cd spælara, tokulyktir, alu felgir, el rútar, el spegl, bert ein eigara, í sera góðum standi.
**Fyrr: 179.000 kr**



**Mazda Premacy 7 pers**

**Árg:** 2005 **Km:** 75.000
**Litur:** silvur **Prísur: 125.000**

Aircondition,7 pers., alu felgir,eykasett av ný vetrardekkum, el rútar, el spegl, cd, í góðum standi. **Fyrr: 159.000 kr.**



**Peugeot 607 2.2 Aut**

**Árg:** 2002 **Km:** 171.000
**Litur:** silvur **Prísur: 139.000**

klimaanlegg, aut gear(trip tronic), koyriteldu, alu felgir, krók o.m.a. í sera góðum standi.
**Fyrr: 179.000 kr**



**Skoda Octavia**

**Árg:** 2003 **Km:** 77.000
**Litur:** silvur **Prísur: 95.000**

Aircondition, tokulyktir, fj.sentrallás, el-rútar, el-spegl, cd-spælara, í sera góðum standi.
**Fyrr: 129.000 kr**



**Landcruiser 4,2/204 Hk**

**Árg:** 1999 **Km:** 155.000
**Litur:** hvítur **Prísur: 279.000**

Aircondition, krók, 18"alu v/ný dekkum, eykasett við píkum, tokulyktir,tónaðar rútar,el rútar/spegl, cd, akk skift kamreim, sera vælhildin og í góðum standi. Skrásettur sum persónbilur.



**Ford Focus Stw**

**Árg:** 2003 **Km:** 72.000
**Litur:** koksgráur **Prísur: 99.000**

Fj.sentrallás, hita í setrunum, el rútar, el spegl, tokulyktir, cd spælara, alu felgir, í sera góðum standi. **Fyrr:139.000 kr**

Fyrivarni verður tikið fyri villum í teksti og prísum

# Vit hava bilin til tín!

Kom og síggj okkara stóra úrval av brúktum bilum.

**Vit hava leigubilar til eitthvørt endamál!**

BILRØKT
*Borgar fyri góðsku...*

BILRØKT · STIÐJAGØTA 3 · FO-100 TÓRSHAVN · TEL: 588880 · BILROKT@BILROKT.FO · WWW.BILROKT.FO